

# FÝRA VERUNLEIKAR, IÐ GUD YNSKIR, AT TÚ SKALT KENNA!

# 1 At tær törvar at verða frelstur.

Öll hava syndað, og teimum fattast dýrd Guds. Róm. 3,23.

Vit viltust öll av leið sum seyður, vit vendu okkum hvör sín veg. Es. 53,6.

Tað er lagað menniskjunum at doyggja eina ferð — og hareftir er dómur.

Heb. 9,27.

Tí lönin, ið syndin gevur, er deyði.

Róm. 6,23.

Verður ein ikki föddur av nýggjum, kann hann ikki síggja ríki Guds.

Jóhs. 3,3.

Tað, ið fött er av kjötinum, er kjöt, og tað, ið fött er av Andanum, er andi.

Jóhs. 3,6

# 3 Gud hevur útvegað frelsu til tín.

Gud hevur jú ikki ætlað okkum til vreiði, men til at vinna frelsu við Harra okkara Jesusi Kristi, Sum doyði fyri okkum.
I. Thes. 5,9-10.

Tí so elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin Einborna, fyri at hvör tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív.
Jóhs. 3,16.

Harrin læt falla á Hann skyldina, ið lá á okkum öllum.
Es. 53,6.

Kristus doyði jú eisini eina ferð fyri syndir, Rættvísur fyri órættvís, fyri at Hann kundi leiða okkum til Gud.

I. Pæt. 3,18.

Náðigáva Guds er ævigt lív í Kristi Jesusi, Harra okkara.
Róm. 6,23.

# 4 Harrin Jesus er förur fyri at frelsa og varðveita teg.

Tí kann Hann eisini fullkomiliga frelsa tey, sum koma til Gud við Honum; tí Hann livir altíð at biðja fyri teimum.

Heb. 7,25.

Hann er mentur at varðveita tykkum frá falli og lata tykkum stíga fram fyri dýrd Sína, ólastandi, í gleði. Judas 24.

Tí við tað at Hann Sjálvur hevur liðið, kann Hann — sum Tann, ið Sjálvur er freistaður — koma teimum til hjálpar, sum freistað verða. Heb. 2,18.

Um tí ein er í Kristusi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið — tað er vorðið nýtt. 2. Kor. 5,17.

# 2 At tú kannst ikki frelsa teg sjálvan.

Mangur vegur tykist manni beinur — og so er endi hansara kortini leiðir deyðans! Orðt. 14,12.

Menniskjað verður ikki rættvísgjört av lógverkum. Gal. 2,16.

Tí av náði eru tit frelst, við trúgv — og tað ikki av tykkum sjálvum, tað er gáva Guds, ikki av verkum — fyri at eingin skal rósa sær. Ef. 2,8-9.

Jesus svaraði: „Eg eri Vegurin, Sannleikin og Lívið; eingin kemur til Faðirin uttan við Mær“. Jóhs. 14,6.

Og frelsa er ikki í nökrum öðrum; heldur ikki er nakað annað navn undir himli, givið millum menniskjur, sum vit skulu verða frelst við. Áp. 4,12.

# HARFYRI

## Vend við.

Gud gevur nú menniskjunum tað boð, at tey öll allastaðni skulu venda við.

Áp. 17,30.

## Trúgv.

Trúgv á Harran Jesus Kristus, so skalt tú verða frelstur, tú og hús títt.

Áp. 16,31.

## Játta syndir tínar fyri Gudi.

Játta vit syndir okkara, er Hann trúfastur og rættvísur, so Hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi. 1. Jóhs. 1,9.

## Játta Kristus fyri menniskjum.

Tí um tú við munninum játtar Jesus sum Harra og trýrt í hjartanum, at Gud reisti Hann upp frá hinum deyðu, so skalt tú verða frelstur. Tí við hjartanum trýr ein — til rættvísi; og við munninum játtar ein — til frelsu. Róm. 10,9-10.

FAE

*Scripture Gift Mission, Eccleston Street, London SW1W 9LZ. Faroese F.T. Printed in Gt. Britain*